

## EINKI VATN

*Síðani vatnorkan gjørdist veruleiki í Vestmanna í fimmti- og sekstiárunum, hevur hetta verið við til at tryggja okkum regluligan streym. Men í samband við arbeiðið at sandblása vatnrørini innan, er alt vatnið tikið úr Lómundaroyruni. Ein heldur sjáldsom sjón, sum fólk kunnu njóta eina tíð aftrat*



## RØRANDI ARBEIÐI

*Í hesum døgum eru mann frá fyritøkuni "Solid Vedlikehold a/s" í Bergen í ferð við at sandblása turbinurørini til Fossáverkið í Vestmanna. Hetta arbeiðið krevur sín mann: Ummálið í rørunum er sera lítið sum myndin vísir, og haraftrat eru dustið so fínt, at tað fer nærum millum skins og hold. Ein av starvsmonnunum hjá norsku fyritøkuni, John Staflund sæst her í holt við at sandblása rørini. Av sonnum eitt rørandi arbeiði*





## AGN TIL HEMARA

*At fiska hemara við Føroyar tykist vera vorðið eitt sera væl umtókt millum føroyingar og útlendingar. Í løtuni eru fleiri føroyskir ferðavinnusmiðir sum bjóða slíkar túrar. Neyðugt er sjálvandi við góðum agni, og tað er hesin danin í ferð við her á bryggjuni í Vestmanna, at fiska seið fyri hemara. Teir høvdu fiskað kvøldið fyri, og fingu tá ikki færri enn fimm hemarar.*



## SJÓVEGIS ÚTFERÐIR

*Eitt av serstøku tilboðunum hjá vestmenningum eru teir vælumtóktu sjóvegis túrarnir til Vestmannabjørgini. Her riggar Silja Star seg til enn ein túr. Tað ræður um at vera væl ílatin.*



## NÓGV VATN

*Tað er heldur sjáldan at Fossá er so vatnrík, sum hon er tað um hetta mundið. Vanliga verður vatnið savnað í vatnsbrunnarnar omanfyri bygdina, men nú ið rørini verða sandblást innan, verður vatnið leitt aðrar vegur. Hetta fáa nú bæði vestmenningar og gestir í Vestmanna gleði av*